LM-047/2020

P/F Trygd
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postboks 44
FO-110 Tórshavn

Telefon +298 358 100
Telefax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Fylgiskjal 4.

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postboks 2037
FO-110 Tórshavn
fmr@fmr.fo

Tórshavn, tann 30. september 2020
Mál nr. 20/00411

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um ferðslu

P/F Trygd hevur fingið omanfyri nevnda uppskot til hoyringar.

Talan er í høvuðsheitum um hesar broytingar:

1. Broyting av allýsingini av lendisakfari
2. Atgongd til upplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni. Uppskotið hevur við sær, at heimildin til atgongd til akfarsskránna hjá Akstovuni verður savnað í ferðslulógini heldur enn í fleiri ymiskum serlógum. Uppskotið leggur somuleiðis upp til, at gjørdar verða skipaðar reglur um elektroniska atgongd til akfarsskránna hjá Akstovuni fyri almennar eftirlitsmyndugleikar, tryggingarfeløg í Føroyum, feløg og stovnar, sum krevja gjald fyri nýtslu av almennum økjum og tænastum, peningastovnar í Føroyum, bilasølur, verkstøð og eykalutasølur.
3. Umbýtan av bretskum koyrikorti til eitt samsvarandi føroyskt koyrikort. Eftir 1. jan. 2021 kann hetta ikki lata seg gera uttan so at farið verður til eftiransandi koyriroynd.
4. Broyting í heimildunum hjá landsstýrismanninum.
5. Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan (sýn). Tað vísir seg ofta at vera trupult hjá fólki at boða frá dagin fyri, sum tey skulu til sýn við bilinum. Hetta verður nú broytt til, at tey kunnu boða frá sama dag, at tað ikki ber til hjá teimum at møta til sýn.

Vit skulu hervið boða frá, at vit ongar viðmerkingar hava til nr. 1, 3, 4 og 5.

Viðvíkjandi nr. 2 hava vit ikki nakra viðmerking til, at heimildin til atgongdina til akfarsskránna hjá Akstovuni verður savnað í Ferðslulógini heldur enn í fleiri ymiskum serlógum, men vit vilja minna á, at vit hava brúk fyri at fáa atgongd til fleiri upplýsingar úr akfarsskránni, enn vit fáa í dag.

LM-047/2020

P/F Trygd
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postboks 44
FO-110 Tórshavn

Telefon +298 358 100
Telefax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Fyri nøkrum árum síðani bleiv atgongdin hjá tryggingarfeløgunum avmarkað til núverandi eigara av einum akfari, har vit áður eisini sóu fyrrverandi eigara. At vit ikki longur síggja fyrrverandi eigara gevur okkum trupulleikar í okkara arbeiði, og viðførir at vit dagliga, og ofta fleiri ferðir um dagin, noyðast at senda fyrispurningar til Akstovuna um fyrrverandi eigara. Hetta viðførir óneyðugt eykaarbeiði hjá bæði okkum og Akstovuni.

Tað er í sambandi við eigaraskifti, og trygging av akfarinum hjá nýggja eigara, at vit hava brúk fyri at síggja:

1. Fyrrverandi eigara, og
2. Upplýsing um nær váttan um eigaraskifti er latin Akstovuni.

Í sambandi við hoyringssvar frá Trygd til broytingar í Ferðslulógini í 2017 (mál nr. S3004-001/16 hjá Samferðaslumálaráðnum), varð víst á týdningin av, at tryggingarfeløgini eisini fingu elektronisk atgongd til **akfarsbókina hjá Umhvørvisstovuni** (hoyringssvarið er hjálagt). Vit vilja hervið nýta høvið til enn einaferð at staðfesta týdningin av hesi atgongd.

Eru spurningar, svara vit fegin.

Vegna P/F Trygd

Vinarliga
TRYGD

Brian Smedemark
Stjóri

Anja K. Øster
Løgfrøðingur